gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Dámar væl Bretland og bretar

**Tummas Hanus Dam, nýggi bretski konsulin í Føroyum viðgongur, at hann bleiv ikki sørt forelskaður í Bretlandi, tá hann fyri skjótt 30 árum síðani gekk á skúla har. –Eg fekk alt fyri eitt tokka til hetta landið og fólkið. Mær dámar væl bretska mentalitetin og mentanina og ikki minst mátan bretar arbeiða uppá.**

KONSLASKIFTI
*Jan Müller*



*Tummas Hanus Dam, bretskur konsul saman við bretska sendiharranum í Danmark, Philip Astley.*

*Mynd Jan Müller*

Tummas Hanus Dam er fegin um at hava fingið litið upp í hendi álitisstarvið sum bretskur konsul í Føroyum. Hann sær tað sum sína uppgávu at røkja bretsk áhugamál í Føroyum. Sum so er tað bert eitt framhald av sínum dagliga arbeiði í dag, har hansara fyritøka DAMFAR umboðar nógvar bretskar framleiðarar av eitt nú góðgæti.

-Konslastarvið røkkur sjálvandi nógv longur enn tað eg arbeiði við í dag. Tað snýr seg um at arbeiða fyri allar fyritøkur í Bretlandi, sum hava áhuga í at etablera seg í Føroyum ella fáa eitt samstarv við føroyskar fyritøkur og marknaðin her. Tí skal eg eisini hjálpa føroyskum fyritøkum við tí.

Hóast hetta verður ein stór avbjóðing og ábyrgd, so sær Tummas Hanus Dam fram til arbeiði sum bretskur konsul. Tað er so heldur ikki uttan orsøk, tí hann hevur havt rættiliga nógv við Bretland og bretar at gera nú í meira enn 30 ár. Hann fór longu til Bretlands í 1971 og var har í tvey ár. Har gekk hann á bankaskeiði og lærdi seg enska málið.

Tummas Hanus Dam viðgongur, at hann bleiv ikki sørt forelskaður í Bretlandi. –Eg fekk alt fyri eitt tokka til hetta landið og fólkið. Mær dámar væl bretska mentalitetin og mentanina og ikki minst mátan bretar arbeiða uppá. Tí bleiv hetta eisini uppaftur meira spennandi, tá eg fór at samvinna við bretskar fyritøkur í 89 í sambandi við góðgætisfyritøkuna Damfar. Tað var ein stór frøði at koma at arbeiða saman við bretskum fyritøkum. So hetta sum nú hendir er eitt slag av framhaldi av tí.

Tummas Hanus vísir annars aftur, at konslaheitið er ein tøkk fyri gott útint handilsarbeiði fyri Bretland. Tummas Hanus hevur annars ítróttarhandlar í Havn og á Glyvrum. Í Havn byrjaði hann í 1977 og lat so upp enn ein ítróttarhandil í Eysturoynni fyri fýra árum síðani. Tummas Hanus heldur tað vera eina góða harmoni í at selja góðgæti og so at hava ein ítróttarhandil.

## Næsti grannin

Hóast vit hava havt nógva samvinnu við Norðurlond og serstakliga Danmark, so heldur Tummas Hanus Dam, at tað er náttúrligt, at vit menna samstarvið við Bretland, sum jú er okkara næsti granni. Hann ivast ikki í, at hetta samsarvið kundi verið nógv størri.

Fyri at økja um samstarvið við Bretland so metir nýggi bretski konsulin, at tað er náttúrligt og rætt, at fleiri føroyingar útbúgva seg í Bretlandi, á tann hátt knýtir tú eisini týðandi vinarbond. –Eg haldi, at hetta við at kunna útbúgva seg í einum øðrum landi er besti mátin at knýta sambond millum tvey lond. Tí vóni eg eisini, at føroyingar fara at taka lut í skeiðvirksemi í oljuvinnuni í Bretlandi. Málið í oljuvinnuni er enskt, og eg haldi, at okkara ungdómur má til at duga at tosa flótandi enskt og ikki sum okkara aldursbólkur bara at kunna"halta" okkum ígjøgnum bretska málið.

Tummas Hanus Dam sær stórar møguleikar fyri tættari samvinnu millum londini ikki minst nú ein oljuvinna er við at taka seg upp á Atlantsmótinum. Hann sær eisini fyri sær, at fiskivinnusamstarvið og samhandilin á tí økinum mennist.

## Takkaði Johan Mortensen fyri væl útint arbeiði



*Á samkomu í Havn takkaði bretski sendiharrin fráfarna bretska konsulinum, Johan Mortensen fyri tíðina hann hevur røkta konslastarvið. Her er Johan Mortensen saman við undanfarna bretska sendiharranum Andrew Bache í Danmark.*

*Mynd Jens K. Vang*

KONSLASKIFTI
*Jan Müller*

Fríggjadagin var lítil samkoma á Hotel Føroyum í sambandi við, at Tummas Hanus Dam er útnevndur til bretskan konsul í Føroyum. Í hesum sambandi vitjaði bretski sendiharrin í Danmark, Philip Astley í Føroyum saman við konuni. Á samkomuni nýtti bretski sendiharrin høvi til at takka fráfarna konsulinum, Johan Mortensen fyri væl útint starv. Hann helt fyri, at Johan Mortensen hevði røkt hetta álitisstarvið bæði væl og virðiliga, men nú hann meira ella minni burturav vildi halga seg komandi oljuvinnuna, sampakkaði tað ikki so væl at halda á fram við konslastarvinum. Hann metti konslaembætið hava verið í góðum og tryggum hondum, meðan Johan Mortensen hevði umsitið tað og metti eisini, at samvinnan millum Føroyar og Bretland er nógv ment.

Men maður kemur í mans stað. Um sama mundið ynskti hann nýggja konsulinum Tummas Hanus Dam tillukku við álitisstarvinum og vónaði, at hann fór at trívast í tí og at tað góða samstarvið, sum Johan Mortensen hevði borgað fyri millum føroyingar og bretar kundi halda fram við einum nýggjum konsuli.

## Vil hava føroyingar at útbúgva seg í Bretlandi

KONSLASKIFTI
*Jan Müller*

Undir samkomuni á Hotel Føroyum legði bretski sendiharrin stóran dent á hetta at fáa føroyingar til Bretlands at útbúgva seg. Hann heitti inniliga á føroyskar fyritøkur um at vera við til at stuðla føroyskum lesandi at fara til Bretlands at útbúgva seg víðari. Í hesum sambandi nevndi hann, at bretskir myndugleikar so eisini vilja geva sítt íkast . Hann metir, at hetta við at føroyingar útbúgva seg í Bretlandi kann vera við til at byggja brýr millum londini bæði.

Tað er eitt ár síðani, at Philip Astley var í Føroyum fyri fyrstu ferð. Tá legði hann stóran dent á at fáa føroyskar myndugleikar at geva bretskum oljufyritøkum, sum vilja vera við í oljuleitingini, gætur. Og boðskapur hansara hesaferð er eisini tann sami: at bretskar og føroyskar fyritøkur finna saman og fara at samstarva, nú oljuvinnan bankar á dyrnar. Hann leggur stóran dent, at tað



*Undir sendiharravitjanini nýtti sendiharrafrúan høvi til at fara ríðitúr við Berghestum. Farið var heilt suður undir Kamb. Her er hon saman við Leif Berg eftir tann fimm tíma langa ríðitúrin.*

*Mynd Jan Müller*

ikki bara er frá bretsku stjórnini í London, at áhugi er fyri Føroyum. Eisini lokal øki sum Caithnes og Aberdeen sýna Føroyum stóra áhuga og eru vitjanir frá hesum økjum í hesum døgum eitt gott dømi um júst tað.

-Tað er eingin ivi um, at við komandi oljuvinnuni og vónandi við stórum oljufundum so fer samstarvið millum londini at vaksa. Vit liggja jú sera tætt upp at hvørjum øðrum og oljuleiðirnar liggja eisini miðskeiðis millum londini. Hetta síggi eg sum eina stóra avbjóðing fyri bæði okkum og tykkum.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



*Sjálvstýrisætlanin, sum løgtingið samtykti 20 apríl, hongur ikki saman búskaparliga. Verður hon framd í verki, kunnu vit roknað við einum hallið í landskassanum á 500 til 600 milliónir, spáar Kári Petersen, búskaparfrøðingur*



Búskaparfrøðingur um sjálvstýrissamtykt:

# Útgjaring forðar fullveldinum

**Skulu vit hava ein sjálvberandi búskap innan 2015, mugu rakstrarútreiðslur landskassans als ikki økjast. Skulu vit náa málinum innan 30 ár, kunnu árligu útreiðslurnar økjast 1 prosent. Sjálvstýrisætlanin hongur tí ikki saman, sigur búskaparfrøðingur og vísir á, at útreiðslurnar hetta samgonguskeiðið eru øktar 5 prosent árliga**

SJÁLVSSTÝRISSAMTYKTIN
*John Johannessen*

Fyri tíggju døgum síðani samtykti løgtingið uppskotið til samtyktar um sjálvstýri Føroya fólks.

Hetta uppskot er ein koyriætlan uppá 11 ár fram móti føroyskum fullveldi.

Men sambært Kára Petersen, búskaparfrøðingi og fyrrverandi fíggjarstjóra í Tinganesi, er hetta ein koyriætlan, sum heilt einfalt ikki hongur saman. Orsøkin er, at samstundis sum landsstýrið sigur hetta vera eina ætlan fram móti einum sjálvstøðugum búskapi og politiskum fullveldi, hækka útreiðslurnar hjá landskassanum meira enn gott er.

Kári Petersen hevur sett upp eina framrokning av avleiðingunum av sjálvstýrissamtyktini.

### Tola ikki útreiðslur

Útrokningarnar hjá Kára Petersen vísa, at um landsstýrið skal kunna náa sínum máli, um at gera føroyska búskapin óheftan av ríkisveitingini umleið ár 2012 til 2015, skulu rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum als ikki vaksa komandi 15 árini.

Verður ætlanin longd, so vit ikki skulu hava ein sjálvberandi búskap fyrr enn um 25 til 30 ár, kunnu vit kortini ikki hava nakran serligan vøkstur í rakstrarútreiðslunum hjá landskassanum. Í útrokningum sínum metir Kári Petersen, at rakstrarútreiðslurnar ikki mugu hækka meira enn 1 prosent árliga.

Samstundis vísir búskaparfrøðingurin á, at sitandi landsstýri hevur økt útreiðslur landskassans við góðum 5 prosentum árliga seinastu trý árini. Og heldur hann, at landsstýrið harvið hevur gjørt føroyska búskapin enn meira heftan av ríkisveitingini, enn hann var frammanundan.

Kári Petersen sigur, at um roknað verður við sannroyndarligum fyritreytum, er avleiðingin av at avtaka heildarveitingina eftir 12 til 15 árum, at hallið hjá landskassanum eftir fáum árum kemur upp á 500 til 600 milliardir krónur.

Í útrokningum sínur roknar Kári Petersen við einum árligum búskaparvøkstri á 2 prosent, tá inflatiónin er frároknað. Útreiðsluvøksturin hevur hann sett til 2 prosent um árið.

### Lønarvøkstur og eldrabylgja

Búskaparfrøðingurin heldur lítlar møguleikar vera fyri at halda útrteiðsluvøksturinum undir 2 prosent um árið. Hann vísir á, at av samlaðu rakstrarútreiðslunum hjá landskassanum uppá 2.750 milliónir, hava 705 milliónir beinleiðis við talið á pensjónistum at gera. Og samstundis vísir hann á, at talið av pensjónistum helst fer at hækka við umleið 2 prosentum árliga í sambandi við sonevndu eldrabylgjuna í Vesturheiminum.

Ein annar stórur partur av rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Kári Petersen vísir á, at í dag fara 1.450 milliónir til lønarútreiðslur. Og roknast má við einum ávísum reallønarvøkstri uppá minst 1 til 1,5 prosent, heldur hann.

– Hetta merkir, at rakstrarútreiðslurnar av sær sjálvum fara at hækka við hálvumøðrum prosenti árliga. Samanumtikið verður tað tí eitt tógvi stríð at halda útreiðsluvøksturin nógv undir 2 prosent, ger Kári Petersen greitt.

### Ongar útrokningar

Kári Petersen vísir á, at vanligt er, at øll lógaruppskot, sum verða løgd fyri tingið, hava í endanum eina frágreiðing, sum greiðir frá, hvørjar fíggjarligar avleiðingar standast av uppskotinum.

Men ongar slíkar útrokningar fylgja við uppskotinum til samtyktar um sjálvstýri Føroya fólks, hóast tað millum annað snýr seg um at lækka stuðulsveitingarnar úr Danmark við 1.200 til 1.300 milliónum krónum.

– Sitandi landsstýri, sum áður hevur gjørt kunningarherferðir um fullveldisætlanina, hevur higartil ikki viljað, dugað ella torað at gjørt eina útrokning av, hvørjar fylgjur nýggja fullveldisætlanin fer at fáa, og leggja ætlanina fyri Føroya fólk. Tí havi eg gjørt mær tann ómak at gera slíka útrokning, sigur Kári Petersen, búskaparfrøðingur.